# - Húsið kundi verið tað mentanarhús, vestmenningar ikki eiga

**Tað sigur Heiðrik á Heygum, nú Heyganeshúsini á havnaøkinum í Vestmanna skulu beinast burtur. Hann hevur gjørt tekningar av húsunum og lutum úr teimum, sum tey sóu út í síni bestu tíð**

FORNMINNI
*Orð: Jón Brian Hvidtfeldt*
*Tekn.: Heiðrik á Heygum*

Nú Heyganeshúsini í næstum skulu beinast burtur, hevur Heiðrik á Heygum verið og hugt at húsunum og tosað við eldri fólk í bygdini, fyri at fáa eina mynd av, hvussu húsini sóu út fyrr. Endamálið er at lýsa húsini, sum tey sóu út, tá tey vóru bygd í 1896. Eisini hevur hann verið í samband við fólk, sum framvegis eiga gamlar lutir úr húsunum.

Fornfrøðingur staðfestir aðrastaðni á hesi síðu, at Heyganeshúsini sum so hava lítið og einki søguligt virði, tí skulu tey setast í upprunastand, er talan um eina »rekonstruktión«. Og tað er ikki so mikið áhugavert hjá Fornminnisavni Føroya, at savnið vil hava húsini friðað.

Men fyri tað kunnu húsini, verða tey sett í upprunastand, vera við til at geva Vestmanna bygd sín serliga dám, og vera eitt minni um eina farna tíð í bygdini.

Heiðrikur á Heygum, sum hevur teknað húsini, sum tey sóu út, metir, at eitt uppskot hevði verið at flutt húsini á annað stað í bygdini, og síðan farið í holt við at umvæla tey.

- Spell er, um hetta prýðiligа hús skal fáa banastingin. Mín vón er,at fólk við hesum tekningum kunnu fáa eina fatan av, hvussu Heyganeshúsið hevur sæð út. Varð húsið endurreist, hevði tað verið ein góður karmur um mentanarlívið, til dømis sum mentanarhús ella fornminnissavn, sigur Heiðrikur á Heygum.

Heiðrikur á Heygum vísir á, at hóast húsið er í ringum standi, so eru framvegis nakrar prýðiligar útskeringar eftir á húsunum. Harumframt finnast nakrir lutir til skjals, sum kunnu siga, hvussu Heyganeshúsið sá út innan. Og út frá hesum ber til at umvæla húsini, so tey koma at síggja út, sum tey gjørdu fyri góðari øld síðan.


Heyganeshúsið, sum tað upprunaliga sá út


Handilshølið innan, teknað eftir frásøgn og funnum lutum


Jarnverkið, sum var runt um tornið. Teknað er eftir tí upprunaliga jarnverkinum, sum enn er til




Vindeyga í Heyganeshúsinum. Tað er enn í húsinum




Handilsbygningurin við torni

## Heyganeshúsini lítið søguligt virði

**Fornminnissavnið hevur ikki áhuga í gomlu Heyganeshúsunum í Vestmanna, sum kommunan ætlar at beina burtur. Húsini eru í sera ringum standi og hava lítið og einki søguligt virði, sigur Símin Arge, settur landsantikvarur**

FORNMINNI
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Vestmanna Kommuna nýtist ikki at óttast uppíblandan frá hægri myndugleikum, nú kommunan í næstum fer at beina burtur Heyganeshúsini, sum standa á havnaøkinum í bygdini. Hetta hóast húsini eru frá 1896.

Hægri myndugleikar eru í hesum føri Føroya Fornminnissavn, sum hevur heimild til at friða húsini, verður mett at tey hava søguligt virði. Men Fornminnissavnið hevur ongar ætlanir um at friða húsini.

- Húsini eru í sera ringum standi. Skuldu tey verði sett í upprunastand aftur, hevði talan ikki verið um ábøtur, men um eina »rekonstruering«, og tað hava vit ikki áhuga í, sigur Símin Arge, settur landsantikvarur. Hann metir, at sum húsini standa í dag, hava tey lítið og einki byggilistarligt virði.

Sjálvt um húsini eru yvir hundrað ára gomul, so er tað í sjálvum sær eingin orsøk til at friða ella varðveita tey, vísir Símin Arge á. Men nú komið er so langt, at arbeiðið at beina burtur húsini er boðið út, og tað tískil kann væntast, at tey hvørva í næstum, fer Fornminnissavnið møguliga at gera nakrar uppmerkingar at teimum. Men enn er ikki endalig støða tikin til tað, sigur Símin Arge.

Sjálvt um Fornminnissavnið sjálvt ongar ætlanir hevur um at friða húsini, so kann henda, at onkur annar biður savnið um at gera tað. Símin Arge hevur enn onga tílíka áheitan fingið.


Føroyska oljufelagið P/F Atlantic Petroleum, við hjánavninum Atlants Kolvetni, varð stovnað í 1998.

Felagið fekk í august 2000, sum partur av samtakinum The Faroes Partnership, tillutað loyvi 001 í fyrsta føroyska útbjóðingarumfarinum. Hini feløgini í samtakinum eru Amerada Hess, British Gas og DONG. Fyrsti brunnurin hjá The Faroes Partnership varð boraður á heysti 2001, og rakt varð við týðandi nøgdir av bæði olju og gass. Kannað verður í løtuni um fundið er lønandi.

Umframt luttøku í føroyskum øki luttekur felagið eisini í tveimum leitiloyvum í enskum øki, P1027 og P1029. Samstarvsfelagarnir eru teir somu sum í føroyska loyvi 001. Fyrsta boringin í enskum øki verður í næstum, beint hinumegin sjómarkið ímillum Føroyar og Bretland. Hesin brunnur er liður í metingini av føroyska fundinum.

Ein partur av verkætlan felagsins hevur síðan stovnan verið at keypa seg inn í feltir, ið longu eru oljuframleiðandi, og er tíðin nú búgvin at fara víðari við hesi ætlan.

Um 2000 føroyskir partaeigarar eiga partapeningin í felagnum, ið er áljóðandi 46,25 milliónir krónur.

Í løtuni starvast 3 fólk hjá Atlantic Petroleum, og harumframt eru ráðgevar knýttir at felagnum.

Atlantic Petroleum

**Postrúm 1228**
**Gongin 10**
**FO-110 Tórshavn**
**Telefon 350100**
**Petroleum@petroleum.fo**
**www.petroleum.fo**

**Búskaparfrøðingur**

Søkt verður hervið eftir búskaparfrøðingi til P/F Atlantic Petroleum. Virksemið felagsins er nú vorðið so fjølbroytt, at neyðugt er at seta fólk burturav at taka sær av rakstrarbúskaparliga partinum.

Vit kunnu bjóða eitt sera spennandi, mennandi og fjølbroytt starv í einum ungum føroyskum felagi í støðugari menning. Talan er um eitt nýtt starv, so setti búskaparfrøðingurin fær stóra ávirkan á arbeiðsgongdina, og við hesum stóran møguleika fyri persónligari menning.

**Starvið**

Setti búskaparfrøðingur kemur serliga at taka sær av

- at gera rakstrarbúskaparligar greiningar, so sum greiningar av íløgum, metingar av nýggjum verkætlanum í sambandi við olju-leiting, útbygging og framleiðslu
- leypandi at gera metingar av verandi loyvum
- at gera innanhýsis greiningar til leiðslu og nevnd
- at gera kunningartilfar til partaeigarar

**Førleiki**

Vit hugsa okkum at tú

- hevur hægri útbúgving sum búskaparfrøðingur við figging/oljubúskapi sum sergrein, ella líknandi
- hevur royndir frá líknandi starvi
- hevur góð greiningarevnir
- hevur góðan málsligan førleika í enskum og føroyskum

Umsókn við prógvum, CV og tilhoyrandi skjølum skulu sendast til P/F Atlantic Petroleum. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri fæst at vita við at venda sær til Wilhelm Petersen, stjóra.

Umsóknir skulu vera felagnum í hendi í seinasta lagi 15. september 2002.